gult cyan magenta svart

VI‹MERKINGAR

Nú kanska eisini Sjálvstýrisflokkurin

Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin - og hvør veit - nú kanska eisini Sjálvstýrisflokkurin

Atli Hansen

Henda greinin var upprunaliga skriva› og send blø›unum 31.10 sum ein vi›merking til seinastu samrá›ingarnar í Keypmannahavn, men kommunuvali› hevur nærmast blokera› fyri øllum ø›rum vi›merkingum enn frá valevnunum og tí kann ein grein sum henda kanska koma at virka eitt sindur anakronistisk. Men um eg helt meg hava ein bo›skap fyri 3 vikum sí›an, so man eg eisini halda meg hava hann í dag og ver›ur tí roynt einafer› enn at fáa hann fram.

Í SvF t‡skvøldi› 31.10 gjørdi løgma›ur greitt, at Heimast‡rislógin kundi vera útgangsstø›i fyri tí broyttu kós hjá samgonguni í fullveldismálinum. Hann tosa›i um úttøming ella ni›urlaging av Heimast‡rislógini og hetta kann neyvan skiljast ø›rvísi enn at vit yvirtaka uppgávurnar so hvørt sum vit eru før fyri tí og harvi› stigvíst fáa búskaparliga ábyrgd av hvørjum málsøki sær. Og at enda eitt búskaparligt frælsi. Gó›ir gamlir sambandstankar.

Hetta eru n‡ggir tónar, sum gera ta› møguligt at broyta kóri› og í hesum sambandi fari eg at loyva mær at minna á grein, eg hev›i í blø›unum fyri júst einum ári sí›an, har eg mælti til, at Sambandsflokkurin, Javna›arflokkurin og Fólkaflokkurin funnu saman um eitt grundarlag fyri framtí›arstø›u Føroya. Tá hev›i ein tílík samgonga umlei› 60% av Føroya fólki aftan fyri seg. Í dag er hetta tali› ivaleyst væl størri.

Sama kvøldi› – t‡skvøldi› 31.10 – hoyra vit formannin fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum bo›a frá, at aftaná at hava rent á sama skeri› 4 fer›ir, er nú ney›ugt at broyta kós. Hetta kann eingin vera ósamdur vi› honum í, men at man skal renna á 4 fer›ir fyri at finna út av hesum, vekir undran millum manna og ikki álit á monnunum á brúnni. At broyta kós merkir væl ta› sama sum at seta sær onnur mál, so hesum er fólkaflokksforma›urin samdur vi› sínum løgmanni í. Vónandi ver›ur hetta máli› so ikki eitt 5. sker, sum teir vi› teirra kamikaze líknandi fer› fara at renna seg á.

Men signalini frá Fólkaflokkinum tykjast at vera grei› og tí eiga andstø›uflokkarnir skjótast at gera uppskot til eitt n‡tt grundarlag, eina n‡ggja tilgongd og bo›a til fundar.

Ta› var lættari hjá Fólkaflokkinum fyri einum ári sí›ani at taka avlei›ingar og sleppa sær burtur úr haftinum. Nú hava teir vavt seg so nógv inn í tjó›veldisspunan, at torført kann vera at koma sær burtur úr aftur. Ta› kann taka sína tí›. Flokkurin kann hava fyri ney›ini at gera ta› upp á sín máta. Men í hesum málinum er tí› ein faktorur, sum er óavmarka›ur. Andstø›an hevur alla framtí›ina fyri sær til at gera hetta. Og tí má bí›ast eftir Fólkaflokkinum ta tí›, ta› nú tekur.

Og mínsann um ikki eisini Sjálvst‡risflokkurin nú tykist at vera komin á betri tankar og venda aftur til sína hóvligu framfer› á hesum økinum. Hann hevur eisini nokk av tí›.

Ta› er bert Høgni Hoydal, sum vi› sínum skundi skal stressa føroyingar til at leypa á bláman, á›renn teir vita til sín, heldur í dag enn í morgin. Men hesin demagogur tykist nú at hava útspælt sín leiklut í hesum umfarinum. Hann fekk ongantí› føroyingar at skilja, hvat i› hann vildi og politiska handalagi› og framfer›arhátturin hava alla tí›ina veri› merkt av misáliti, óhóskandi atbur›i og vantandi kunnleika til grundleggjandi altjó›a samanhangir. Hann hevur forpesta vi›urskiftini millum Føroyar og Danmørk, so torført kann vera hjá ø›rum at koma afturumaftur. Ma›urin, sum er so fullur av hatri til Poul Nyrup og alt ta›, sum danskt er, var sjálvandi í forvegin diskvalifisera›ur til at standa á odda fyri kenslubornum diplomatiskum samrá›ingum. Hetta mátti enda gali›.



Og hann enda›i í díkinum. Úrlatin og láturverdur á altjó›a pallinum. At hann framvegis droymir um vi› eini fólkaatkvø›u at lokka føroyingar til at leypa út av eggini, er bert ein manifestatión av hansara vantandi evnum til at sta›festa politiskar veruleikar og taka avlei›ingar av teimum. Í øllum ø›rum parlamentum í vesturheiminum, hev›i ein stjórn ella ein rá›harri langt sí›ani lagt frá sær eftir at hava fingi› ein tílíkan lúsing. Men sum Heini O. Heinesen seg›i í somu sending: »Vit skulu berast úr Tinganesi«. Her galda ongar parlamentariskar spælireglur. Her ver›a ongar parlamentariskar avlei›ingar tiknar. Okkara samgongupolitikarar nokta at liva upp til st‡risskipanina.

Og enn einafer› stendur Tjó›veldisflokkurin saman vi› formanninum uttan úrslit. Nógv orka og nógvur peningur eru n‡tt til at fremja hesar veruleikafjaru ætlanir, sum kanska ongantí› hava veri› meintar í álvara. Føroya fólk aftur hildi› fyri gjøldur.

Har er helst stór upprudding at gera á›renn farast kann í gongd aftur. Men bo›ini mugu fara, signalini mugu sendast, so teir nevndu flokkar kunnu fara undir at gera ta› brei›a grundarlagi› fyri framtí›arstø›u Føroya. Vi› teimum bo›um, sum løgma›ur t‡skvøldi› sendi gjøgnum SvF tykist ikki at vera torført at finna eina felags lopfjøl. Og hann hevur baklandi vi› sær.

Um hann bert ikki fer at skriva út val nú. Tí nú er mentamálarа›harrin farin at meina, at ein grundlóg ikki skal takast í sama álvara sum ein 1. mai. Ilt er at gita, hvat hesin ma›ur hugsar, men at vísa so líti› av respekt fyri okara grundlóg og teimum rættindum, vit hava fingi› vi› henni, sigur naka› um ta anarkismu, vit hava í væntu, um fullveldisætlanirnar ver›a førdar út í lívi›. Kanska uttan grundlóg ella í hvussu so er eina, i› ikki tryggjar okkum somu frælsisrættindi sum danska ella nor›urlendska modelli›. Ein óhugnaligur tanki.

Spurningurin er um politiskt fríggjarí ikki eigur at liggja fremri í huganum enn eitt val nú. Helst er ta› betur at fáa tosa› saman og lagt stø›i fyri samarbei›inum um tey ríkisrættarligu vi›urskiftini, á›renn fari› ver›ur til val. Og tá ber betri til at spyrja fólki› á einum vali.

Eg fari at ynskja teimum gó›a eydnu og gó›an arbei›shug. Vi› meira veruleikakendum málum og grundarlagi ver›ur ta› hugaligari at fara til arbei›is.

Havtaska á vegnum

Vegurin vi› tunnilsmunnan á Oyrarbakkamegin, var fjaldur av havtasku, sum var rósa› úr lastini á einum lastbili
(Mynd: Árni Dam, Nor›skáli)

Vegurin við tunnilsmunnan á Oyrarbakkamegin var fjaldur av havtasku, sum var rósað úr lastini á einum lastbili

Sveinur Tróndarson

Lastbilurin, sum var á veg av Fiskamarkna›inum á Toftum til Kaldbaks, misti alla lastina á vegin, beint sum hann kom úr tunnlinum Oyrarbakkamegin.

Førarin á bilinum sigur, at hann hev›i um tíggju tons av havtasku í lastini, og at hon brádliga fór á gli›.

– Tá var einki at gera, og alt enda›i á vegnum, sigur hann.

Lastbilurin hevur inniloka›a last vi› presending, men ein slík presending heldur ikki um tíggju tons fara á gli› eins og tey gjørdu í morgun. Ta› gjørdi hendan heldur ikki, hon skrædna›i og alt fór á vegin.

Bilførarin og ein annar ma›ur fóru alt fyri eitt at taka fiskin uppaftur. Nógvir kassar lógu á vegnum og onnur breytin var meiri ella minni blokera› so leingi sum havtaskan var› liggjandi á vegnum. Tí var ney›ugt at fáa rudda› upp, sum skjótast.

Tá vit tosa›u vi› bilføraran, um middagsleiti›, vóru teir um at vera lidnir, og sum skiltist á honum, vóru fólk frá landsverkfrø›inginum á veg á sta›i› at spula vegin, sum er vor›in heldur enn ikki hálur av øllum fiskinum.

Hví óhappi› hendi er ikki gott at siga, men eitt bo› er, at fer›in hevur veri› heldur høg í mun til umstø›urnar, tá lastbilurin er komin úr tunnlinum.

Sum skilst ver›ur fiskurin ikki burturbeindur hóast hann hevur ligi› á vegnum. Hann ver›ur brúktur sum onnur sortering.

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 24. november til hósdagin 30. november

Robinson 2000

Seks teir seinastu luttakararnir kunnu nú allir hóma eitt finalupláss. Tí er Robinson-Dysten hesuferð av alstórum týdningi.

Kappestriden er ein klassikari, har eyguni hjá luttakarunum nú spíla seg út, tí teir fáa ein dyggan skelk. Hetta verður hinvegin ikki tann einasti skelkurin, sum luttakararnir fáa í kvøld.

Í meðan luttakararnir bíða, kunnu teir hugna sær í tí heitu sólini.

»Talbit«

Árant J. Hansen ummælir:

Stórhendingin í fjølmiðlunum í hesa vikuna var sjálvsagt kommunuvalið síðsta týsdag. Tað má sigast, at nógv varð gjørt burturúr. Tað er gott, at borgarar hava allar møguleikar at fylgja við. Útvarp á tveimum rásum, sjónvarp, tekstvarp og internet. ÚF og SvF geva okkum eina kenslu av, at her eru vit føroyingar saman um nakað. Tað er hugnaligt at hyggja og/ella lurta eitt slíkt kvøld. Og John Sigurd er ein frálíkur vertur. Hann dugir at vera har eitt heilt kvøld, uttan at gerast høvuðspersónur sjálvur.

Føroyingurin hevur síðani 1957 latið seg stýrt av fyrsta luftborna miðli í so stórt mát, at hann leggur sín gerandis- og heilidag til rættis eftir honum. Í sending herfyri, har Jógvan Arge hevði prát við ein gamlan sjómann, varð sagt, at í Gøtu rýmdu allir arbeiðsmenn av bryggjuni, tá útvarpið kom, hóast nógv var eftir at gera. "Soleiðis var tað bara tá" segði hesin sáttligi maður.

Áðrenn kommunuvalið yvirtók allan fjølmiðlakapasitetin í landinum, var ein veljarakanning ovast á skránni. Í fýra til fimm dagar høvdu tíðindafólkini ikki annað at gera enn at greiða frá øllum tølunum í hesi kanning. Tað merkisverda var, at tey fingu nýggj tøl í kanningini til høvuðstíðini hvørja ferð. Persónliga var eg so troyttur av hesum luftbornu talgreiningum, samstundis, sum eg sá fyri mær líknandi tíðindaflutning, tá nógv umtalaða kommunuvalið endiliga skuldi haldast tann 21. november.

Týsdagurin hin 21. november upprann, og út ímóti døgurða byrjaði sami sjongur aftur: Á Hellunum hava 2 fólk verið á vali í dag móti 1 seinast. Hetta er ein øking upp á uml. 50 % samanlíknað við valið í ’96. Og so varð farið landið runt, og eg rokni ikki við, at nakar sløkti. Sjálvt um tað vóru upplýsingar, ið ikki søgdu nakað sum helst. Annars meini eg, at sjálvar valsendingarnar vóru góðar, tó at tær manglaðu nakað av undirhaldi. Tað var áhugavert og viðkomandi at lurta eftir panelinum í sjónvarpinum. Góðir spurningar og greið svar. Nýggju tøknina í SvF kunnu vit øll gleðast um.

Bestubitar: Seinasta hvalastøðin

Basalt

Lige på kornet

Bólkurin "I Am"